

*Sterkir mannaarmar lyfta sovandi kvinnukroppin, fáa hana at vakna, rísa upp úr dvala til tilvitan, úr einsemi inn í felagsskap*

*Mynd: Tina Johannesen*

*Slík tiltøk skapa menniskju, ið verða íblást og møguligar framtíðar eldsálir á mongum samfelagsøkjum.*

mannaljóð, ja alskyns ljóð úr Dímunarkvirruni.

Tað er sterkt og bergtakandi – til tíðir hárreisandi, samstundis sum djúpar hugleiðingar hábærsliga verða frambornar á føroyskum, íslendskum og norskum.

Tey skiftast um at hava stuttar munnligar hugleiðingar, t.d. um kvirru, lívsmeining, lívsleti, dreymar, sakn, frið.

Ein sigur um Lítlu Dímun: "Har búgva trøll og álvar, tí tey dáma at búgva har, tí tað er so friðarligt"

Beinleiðis endurtikið úr Dímunarbóklinginum:

"Av og á var tað so friðarligt, at eg hoyrdi hjartað hjá mær banka. Tað er langt síðan."

" Eg havi hug at nerta við sjógvin, ið umringar meg, men eg røkki ikki."

"Vitjanin í Lítlu Dímun er nakað, ið eg aldrin fari at gloyma og ein dag fari eg at fortelja hetta fyri mínum ommubørnum."

Tá myrkrið og náttin sígur seg um Dímunar, kvirra hugsjónarhóp, fyllist myrkrið og brádliga hoyrist, sum ein trilvandi troyst, vælkendi kvøldsangurin:

"Góða mamma eg vil sova
eygu míni møðast brátt
Jesu pápi hevur lovað
meg at verja væl í nátt"

Fyrst syngja tey við føroyska tungumálinum.

Næstu og triðju ferð eru øll við – við føroyskari tungu. Spakuliga, inniliga trygg, balla tey seg inn í myrkrið og kvirruna við alskyns ljóðum og náttina, meðan nynnað verður lagið, góða mamma ...

Úr náttarmyrkrinum trínur fram ein sterkur mannfólkahamur, gongur varisliga millum teir sovandi kroppar. Steðgar, tá hann kemur til eina yndisliga fagra kvinnu, lyftur hana upp og ber henda sovandi kroppin yvir til ein stiga, mótsatt pallinum, fær hana at klatra upp. Seinni síggja vit ljós og skuggamyndir gjøgnum gluggarnar í galvinum í Losjuni. Vit síggja eitt rørsluspæl, tey tosa saman og kærleikin sprettir.

Súmbolst/ímyndarligt sera vakurt, tí klatranin upp, úr dvala til tilvitsku, einsemi og felagsskapurin, lítla smáttan undir galvinum, líktist so sera nógv hesa løtuna Jákupsstovu í Lítlu Dímun, har tey høvdu búleikast.

## Úrslit

Indianarar søgdu umleið soleiðis um viðurskiftini millum menniskju og náttúruna: Tá menniskjað missir sambandið við náttúruna og djórini, so missir tað eisini sambandið við seg sjálvan og onnur menniskju.

Kvirra Oyggin – verkætlanin setur fokus á náttúruna, menniskju og okkara sansaevnir heldur enn materiel virðir og hurra... fyri tí. Vit hava brúk fyri ungdómi, ið hava hesar royndir. Slíkar verkætlanir kunna, sum ringar í vatninum, spreiða seg á øllum samfelagsøkjum, og vit áttu at havt nógv fleiri slíkar verkætlanir millum ungdómin. Verkætlanir, ið eru avbjóðandi fyri alt menniskja. Ein vika og somikið komið burturúr. Slík tiltøk skapa menniskju, ið verða íblást og møguligar framtíðar eldsálir á mongum samfelagsøkjum.



*Leikarar og luttakarar í menningarverkætlanini, Kvirra Oyggin. Glað og væl nøgd eftir leikin, væl uppiborðin gleði*

*Mynd: Maud Næs*



*"Lítla Dímun – ótrúligt... fantastist upplivilsi", segði ein strálandi glaður ungur maður umborð á Smyrli, meðan hann royndi at seta orð á upplivilsið. Eftir leikin segði Arnfinnur Nesá seg vera væl nøgdan við alla verkætlanina sum heild. Fyriskipanin vera sera dugnaliga, tá hugsað var um alt, tey høvdu fingið ungdómin til. Øll vóru glað, at leikurin eydnaðist so væl, framleiðarar, leikarar og áskoðarar*

*Mynd: Maud Næs*



*Katrine Marie Eponine Strøm, ið fann uppá menningarverkætlanina Kvirra Oyggin. Saman við henni sæst Olafur Gudmundsson. Bæði eru útbúgvin innan sjónleikarheimin. Tey hava staðið aftanfyri framleiðsluna saman við Áslaki Nesá úr Gøtu*

*Mynd: Tina Johannesen*